# Ársaðalfundur

## í P/F Suðuroyar Sparikassa

SUÐUROYAR SPARIKASSI

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Suðuroyar Sparikassa mánadagin 3. mars 2025 kl. 16.00 á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Suðuroyar Sparikassa, Vágsvegur 60, Vágur.**

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.
4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.
   *Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna Annu Borg Dahl, løgfrøðingur, ráðgevi í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Mækjugøta 19, 100 Tórshavn, sum nevndarlim.*
5. Val av nevndarlimum.
   *Hans Petur Joensen og Jákup Flóvin Sigmundarson Olsen standa fyri vali sambært § 14, stk. 2, og § 21, stk. 4 í viðtøkunum. Nevndin mælir til, at Hans Petur Joensen og Jákup Flóvin Sigmundarson Olsen verða afturvaldir.*
6. Val av grannskoðan.
   *Nevndin mælir til afturval av verandi uttanhýsis grannskoðara, Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki.*
7. Uppskot frá nevndini:

   Nevndarsamsýning 2025:*Nevndin mælir til, at samsýningin til nevndarlimir felagsins verður óbroytt galdandi fyri 2025 soleiðis, at aðalfundurin viðtekur at samsýningin til nevndarlimir felagsins fyri 2025 verður latin samsvarandi samsýningar politikki felagsins frá mars 2022, við støði í hesum:*

   *Grundsamsýning: 60.000 kr.*
   *Nevndarformaður: 2 x grundsamsýning*
   *Næstformaður: 1,5 x grundsamsýning*
   *Aðrir nevndarlimir: 1 x grundsamsýning*

   *Fyri eykaarbeiði, í nevndini ella aðrari nevnd ella serligar nógvar nevndarfundir, kann veitast ein eykasamsýning.*
8. Ymiskt

Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi tórsdagin 27. februar 2025 hava boðað felagnum frá luttøku á deildum felagsins í Vági ella í Tórshavn.

Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundinum og at greiða atkvøðu verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga mánadagin 24. februar 2025.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva skrivliga fulltrú. Fulltrúarskjal er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins.

Skjal at nýta í samband við møguliga brævatkvøðu er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins. Um so er, at tygum ynskja at geva brævatkvøðu skal brævatkvøðuskjalið vera móttikið á høvuðsskrivstovu felagsins í seinasta lagi mánadagin 3. mars 2025 kl. 13.00.

Grannskoðaða ársfrásøgnin kemur saman við dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum at liggja frammi á høvuðsskrivstovu felagsins í Vági í seinasta lagi 2 vikur fyri aðalfundin.

P/F Suðuroyar Sparikassi
*Nevndin*

AnnIjanni